# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Har garðurin er lægstur

Í gjár viðgjørdu vit avgerð landsstýrisins um at lata donsku ráðgevingarfyritøkuna Valcon kanna føroyska sjúkrahúsverkið. Vit nevndu, at Valcon ikki kemur at kanna bygnaðin, sum vit meta er ein tann størsti trupulleikin í føroysku sjúkrahússkipanini. Við ikki at lata Valcon kanna hetta økið, verður lopið uppum, har garðurin er lægstur. Líta vit at arbeiðssetninginum hjá Valcon, so snýr hesin setningur seg um 1) at greina búskaparstýring og at eyðmerkja orsakir til øktar útreiðslur og meirnýtslu, um samanberingar við lond, sum líkjast okkara, og hann snýr seg um at samanbera føroysku sjúkrahúsútreiðslurnar í mun til BNP við somu útreiðslur í Norðurlondum. At enda skal Valcon koma við uppskotum um ábøtur á hesi trý kanningarøki.

Her er talan um reint fyrisitingarlig viðurskifti og um upplýsingar, sum miðfyrisitingin og sjúkrahúsfyrisitingin sjálvandi liggja inni við ella í minsta lagi kunnu útvega. Tað skuldi ikki verið neyðugt at farið út um landoddarnar eftir fyritøku til hesa uppgávu. Hinvegin kann tað sjálvsagt vera skilagott at fáa fremmand eygu at koma við íblástri ella uppskotum til einfaldari og ódýrari fyrisitingarligar mannagongdir. Men hvørki Valcon ella nøkur onnur útlendsk ella innlendsk fyritøka kunnu loysa spurningin um øktar útreiðslur og meirnýtslu, tí hesir trupulleikar eru grundleggjandi av politiskum slag. Politiski viljin hevur í áravís verið tann, at so nógv viðgerðartilboð, sum møguligt, skulu vera í Føroyum. Við tí stóru menning, ið er á øllum heilsubótarøkinum er sjálvsagt, at útreiðslustøðið hækkar. Spurningurin er tí: hava løgting og landsstýri vitað, at samsvar fór ikki at verða millum rakstur og játtanir? Ein kann hava varhugan av, at talan er um vælkent fyribrigdi í føroyskum politikki: stovnur skal varðveita virksemið, men hann fær ikki játtan samsvarandi.

Eftir stendur tann týdningarmesti og mest álvarsami spurningurin: Hvat skal yvirskipaði heilsupolitikkurin fevna um og hvussu skal hann fíggjast. Hvussu skal sjúkrahúsbygnaðurin síggja út í framtíðini? Hvussu nógv sjúkrahús skulu vit hava í Føroyum? Hvat skal teirra virksemi fevna um? Hvørjar viðgerðir skulu vit bjóða her heima? Nær og hvar skal føroyingurin út í heim at søkja sær heilsubót? Hvussu nógv eru vit til reiðar at rinda fyri heilsubót í eini tilgongd, har viðgerðarmøguleikarnir gerast alt betri og betri samstundis, sum teir gerast dýrari og dýrari. Her hanga nógvir stórir spurningar uppií: fólkaheilsa, eldrapolitikkur, barna- og ungdómspolitikkur, undirstøðukervi, ferðslutrygd o.m.a. Landsstýrismaðurin hevur sett á nógvar av hesum spurningum, men fyrr enn vit hava gjørt upp við okkum sjálvi, hvønn sjúkrahúsbygnað, ið vit vilja hava í framtíðini, koma vit ikki úr stað. Hetta kann bert greiðast í politisku skipanini, og hetta kann greiðast, um viljin og dirvið til broytingar er til staðar.

**Sosialurin**

## Tunnlatos

SÓLRUN JACOBSEN

Til tykkum báðar: Gerard og Páll!!!

Nú er nógmikið hjá teimum flestu at hoyra um tykkara lokala møsn um tunnlar. Tað er fatað, at tit bert hugsa lokalt – og enntá so galið, at ein av tykkum væntar at fáa ein tunnil í føðingardagsgávu? ella hvussu kann ein skilja tað?

Um tit so fegin vilja hava samband við Havnina – ja so flytið. Er tað ikki so, at Teistin siglir eini 11 ferðir ella so um dagin?

Tit mugu læra tykkum at hugsa um, at tað búgva onnur fólk í FO, uttan sandoyingar, og sum kanska eru verri fyri og veruliga hava meira brúk fyri teimum miliónunum, ið ein tunnil kostar.

Havið tol og hugsið um hini.

Kanska tit báðir skuldu hugsa um at farið og gjørt okkurt annað og ikki sitið í tinginum.

# Lions Club leitar eftir listafólkum

**Aftur í ár skipar Lions Club Tórshavn fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi í Havn á ólavsøku. Freistin hjá teimum, ið vilja sýna fram har, er úti mánadagin 21. juli**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*



*Í fjør tóku 37 listafólk lut á ólavsøkuframsýningini hjá Lions*

Í fjør sýndu ikki færri enn 37 listafólk fram yvir 130 listaverk á ólavsøkuframsýningini hjá Lions Club Tórshavn, og nú gjørt verður klárt til framsýningina hesa ferð, verður vónað, at fleiri vilja sýna fram sína list.

Hvørt ár fer ágóðin av framsýningini til okkurt vælgerandi endamál, og hesa ferð fara pengarnir til eina ráðstevnu um orðblindni, sum verður á Hotel Føroyum tann 12. september.

Men eingin listaframsýning uttan listaverk, og tí boðar Lions Club Tórshavn nú frá, at tey, sum ynskja at sýna síni listaverk fram í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku, mugu gera skjótt av, tí freistin at boða frá luttøku er úti mánadagin.

Tey, sum hava hug at vera við, skulu seta seg í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 211470, 243228 ella 312341, og tað má gerast áðrenn 21. juli, so stundir eru at skráseta listaverkini og at gera framsýningina klára. Framsýningin í ár er opin frá 27. til 29. juli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.